## DAGSINS MEINING

# Politikkur komin í Múrin!

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Torbjørn Jacobsen, hevur eftir øllum at døma tikið málið um Múrin í egnar hendur og hevur harvið sett fakkunnleikan og myndugleikan á hesum øki, landsfornfrøðingin, til viks. Hetta er komið fram, eftir at tað tók Kommunala Eftirlitinum hálvt triðja ár – ja, rætt varð lisið – at viðgera kæruna hjá Føroya Fornminnissavni ímóti avgerðini hjá Kirkjubøar kommunu at krevja byggiloyvi fyri at turka og umvæla Múrin.

Landssttýrismaðurin hevur nú boðað frá, at ein nevnd skal setast, og ein arkitektakapping skal skrivast út um, hvat skal gerast við Múrin endaliga! So er spurningurin, um henda nevndin so skal hava valdið oman fyri myndugleikan á hesum øki? Ella hvussu hevur landsstýrismaðurin hugsað sær, at vald og kompetansa skal býtast?

Nú eru meira enn fýra ár síðani, at Føroya Fornminnissavn gav út eina frágreiðing um Múrin og hvussu hann skuldi turkast og umvælast. Til hetta arbeiðið hevði Savnið brúkt fleiri av fremstu serfrøðingunum í Norðurlondum. M.a. ein av fremstu monnum innan varðveitingarøkið, danan Søren Abrahamsen. Í fyrstu atløgu varð mælt til at turka Múrin, umvæla hann og gera eina kanning um støðuna og møguleikar. Og síðani nevndi arbeiðsbólkurin møguleikan at skriva út eina kapping um, hvussu Múrurin møguliga skuldi síggjast út. Dentur varð lagdur á, at henda raðfylgja varð fylgd, tí ringar royndir eru frá fyrst at skriva út eina arkitektakapping.

Men um somu tíð kom ein arbeiðsbólkur, serliga við fólki úr Kirkjubøar sókn, við einum uppskoti, sum Palli Gregoriussen, arkitektur, hevði gjørt um at inniloka Múrin. Líkt varð til, at landsstýrismaðurin, sum tá sat, varð hugtikin av hesum uppskoti, og sperðil kom í málið. Tann ivingarsama avgerðin hjá bygdarráðnum hevur forhálað málið og nú benda útmeldingarnar í málinum á, at málið helst verður drigið uppaftur longur út, hóast fremstu menn á hesum øki hava verið uppi í frammanundan.

Vit hava eina lóg á hesum øki, fornminnalógina. Vit hava ein stovn við fakkunnleika, Føroya Fornminnissavn. Vit hava ein myndugleika, landsfornfrøðingin. Men vit hava eisini ein landsstýrismann, sum nú tykist vera komin undir eitt ella annað trýst, har møguliga lokal og politisk áhugamál bráddliga tykjast koma fram um lóg, myndugleika og fakkunnleikan á hesum øki! Sami maður vil hava skilnað millum landsstýrismanin og kringvørpini. Vit hava mett, at hann hevur tikið eina skilagóða støðu í tí málinum, men kunnu ikki siga tað sama í Múramálinum, har vita seta spurnartekin við ta mannagongd, sum landsstýrismaðurin hevur valt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vitloysisrásin, LINDIN!



**Ívar Iversen**
*Á Heiðaskákinum 9,*
*29. apríl 2001*

*»I Jesu Navn, skal al vor Gerning ske, om den i Sandhed vorde skal til Gavn…* yrkir Johan Frederiksen í fyrru helvt av 1600-talinum – rektari í Roskilde.

Hendan yvirskrift er sett sum eitt minni um tey, ið hava balst her á landi í langa tíð og livdu í teirri sterku og óreingiligu trúgv á Vár Harra, at í hansara navni skuldi alt handligt og andligt vera útint. At nevna útróður, fjallgongu, bjargaferðir og annað mangt í tí sambandi er óneyðugt, tí tað er væl og virðiliga lýst aðrastaðni.

*Jesus fylgi tær… Hann veri eftir hjá tær…* var ein vanlig heilsan, tá menn fóru til skips og komu at biðja skyldfólki og vinfólki farvæl. Hetta var ikki bara ein hissini heilsan. Her lá nakað djúpari undir. Mangir teirra, ið høvdu borið hesa heilsan fram, komu ikki afturíaftur. Kortini hevði ynskið um at *Jesus fylgi* tær, styrkt tey ið eftir sótu og trúðu orð Bíbliunnar, um hvar vit einaferð aftur skulu hittast – uppi hjá Guði.

Vit ið trúgva á uppreisn Jesu og líta á orð hansara um frelsu fyri hvønn tann ið trýr, hava kortini dag og dagliga fyri neyðuni at biðja til hansara til tess, at vit mega varðveita hesa trúgv og fáa fyrigeving fyri alt tað, ið dag og dagliga troðkar á og togar og roytir í okkara syndiga kjøt.

Nú eitt kvøldið skrúvaði eg lurtitólið á eina støð, ið kallar seg *Lindin*. Har fekk eg ein tílíkan skelk, at eg bað Jesus standa hjá mær. Tað, ið har fór fram, var so groteskt, at eg fór at spyrja meg sjálvan, hvørt nakað er, sum eitur eitt etiskt ráð. Hetta etiska ráðið eigur at gera greitt, at tey, ið hava fingið sendiloyvi, eiga at duga sær hógv og laga seg eftir teirri fyriskipan, ið tað etiska ráðið ásetur. Í hesi »seansu« – 26/4 millum klokkan 23 og 24 á kvøldi – sótu tvey fólk, Jenis av Rana, lækni, løgtingsmaður og Guð viti hvat, og eitt konufólk, og jublaðu fullkomiliga vitleyst. *Hallelja, Amen, Haleluja, Amen …* o.s.fr. … áhaldandi …

Hendan unga gentan virkaði viðhvørt, skilti eg tað rætt, sum fór hon at tosa í tungum; og tað eg helt meg skilja av tí, hon segði, orðaði hon seg á sponskum, ella øðrum latínskum máli. Jenis skrólar uppí saman: Amen-Halleluja, meðan hon uppímillum tekur afturíaftur okkurt á fremmandum máli. Eitt nú bóðu tey um, at gøturnar í Havn skulu vera *tómar* (allir ungdómar, alt fólk týnt?), Klub-20 og onnur syndabøli lokast, har ungdómur leitar sær til gamans. Fullir ungdómar, ið vála úti á gøtunum, eiga at verða burturbeindir (tøkk fái Guð, at eg eri ikki sum hasin tollarin, tykist vera aðaltátturin. – *Guð lati meg góðan tí tala!* Hvussu fólk annars tíggja sær heima við hús, er teirra søk. Her er talan um eina almenna sendirás!

Tá eg hevði fingið nóg mikið av hesi, eftir mínum tykki, blasfemisku orðaskolan, helt eg stundina vera komna til at fara til songar; klokkan var tá farin um miðnátt, og biðja *Faðir Vár!*

Jensi av Rana og Lindin er eftir mínum tykki í mongum førum ein hættislig rás í útvarpssendihøpi. Børn, hálvvaksin og viðkvæm duga ikki altíð væl á at skynda. Skal hendan rásin við sínum, eftir mínum tykki, sjúkligu sendingum, ótálmað sleppa at hóreiggja sær sum henni lystir og kanska koma ungum, ósketnum og minni væl at sær komnum í eitt trúðarófæri, so er spurningurin, hvørt vit skulu steðga hesi rás ella lata hana greitt vita, at hon eigur at lúka ávísar treytir fyri sømiligum sendingum, sambært einum etiskum ráði.

Sum **er**, er Lindin, eftir mínum tykki, lítið tignarlig – kortini ikki í øllum førum, har eitt nú menn sum Svenning av Lofti og onnur, ið umboða aðrar trúarbólkar, viga upp ímóti. Jenis av Rana hevur, haldi eg, tilskilað sær rætt, sum ein annar »inkvistorur«, at áseta lívsførslu okkara, og átti tískil ikki at sloppið at staðið fyri einum sendiloyvi. Hann er útbúgvin lækni og dugir helst at røkja tað, hann er settur og útbúgvin til.

Higar til lands hevur hann, saman við øðrum, drigið fólk líka sunnan úr Afrika til tess at vísa, hvussu ávísir trúarbólkar kunnu vekja deyð uppaftur til lívs, grøða tey, ið liggja til at doyggja av eyðkvæmi – »AIDS«, og annað mangt. (Okkum rennur til hugs evangeliini um einkjuna í Nain, dóttir Jairusar, Lásarus og onnur undurverk, Jesus gjørdi). Hví útinnir hon ikki undurverk síni, har tey eru mest átroðkandi – júst í heimsparti sínum – Afriku? Jenis av Rana er eftir mínum tykki, fólkavaldur ella ikki, hættisligur, tá hann fær leysar teymar at gera, sum honum lystir og oyðileggja eina sunna menning millum øll okkara ungu. Vit vanligu biðja fyri teimum dag og dagliga.

**Sosialurin**
Sosialurin
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]
**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.
**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



Føroya Handilsskúli søkir eftir

**LÆRARUM og TÍMALÆRARUM**

frá 1. august 2001 ella eftir nærri avtalu. Hevur umsøkjari útbúgving í lærugreinum, sum nøkta tørv skúlans, kann talan verða um fast starv.

**Tórshavn**

**FHS**:
Virkisbúskapur á C-stigi (8 t/v), Týskt á stigi E/C ( 8 t/v), Fiskivinna (6 t/v), Marknaðarførsla (4 t/v), Samfelagslæru (8 t/v), Støddfrøði D/C (8 t/v), Kunningartøkni (8 t/v), dekoratión (3-6 t/v), Spanskt (4 t/v) og Føroyskt (16 t/v).

**HH**:
Føroyskt (8 t/v), Fyriskipan (4 t/v), Sølubúskapur (8/v), Støddfrøði (4 t/v), Fiskivinna (3 t/v), Samtíðarsøga (12 t/v), Altjóða búskapur (5 t/v), Vinnulívsrættur (6 t/v), Danskt (15 t/v) og Týskt (8 t/v).

**Kambsdalur**

**FHS**:
Dekoratión (3 t/v), Kunningartøkni C (4 t/v), Marknaðarførsla C (4 t/v), Samfelagslæra C (4 t/v), Spanskt E (5 t/v), Støddfrøði C (4 t/v) og Týskt E/C (8 t/v).

**HH**:
Altjóða búskapur A (10 t/v), Danskt B/A (12 t/v), Enskt B (8 t/v), Føroyskt B/A (12 t/v), Kunningar-tøkni B/A (8 t/v), Marknaðarførsla A (4 t/v), Sálarfrøði C (4 t/v), Samtíðarsøga (8 t/v), Sølubúskapur B/A (13 t/v), Støddfrøði B/A (20 t/v), Týskt C (8 t/v) og Vinnulívsrættur C (9 t/v).

Barnsburðaravloysara til uml. 1. mars 2002:
Týskt B (4 t/v) og Enskt A (10 t/v).

**Førleikakrøv:**
Prógv frá handilsháskúla, lærdum háskúla, handilsfaklæraraprógv ella onnur við øðrum fortreytum. Umsøkjarar við vinnuroyndum hava fyrimun.

**Setanarkor til fast starv:**
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð. Tann, sum settur verður í fast starv, má vera til reiðar skjótast gjørligt at fara undir kravda náms-frøðilga útbúgving. Lærarar, sum settir verða í fast starv, mugu rokna við í ávísan mun at skula undirvísa á fleiri stigum og partvís um kvøldið gerst tað neyðugt.

**Løn:**
Í lønarrensli 13/21/24, 18/26/29, 16/21/29/31 hjá HL ella eftir avtalu.

**Leyst at søkja:**
25. apríl 2001. Galdandi til 10. mai 2001.
Umsóknin skal sendast skúlanum, sum umsøkjarin ætlar at starvast

**Umsókn fast starv:**
Umsókn við ljósprentum av próvskjølum o.ø., skulu stílast til Føroya Handilsskúla, stýrið og sendast antin til Føroya Handilsskúla í Tórshavn, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177 ella Føroya Handilsskúla á Kambsdali 530 Fuglafjørður og verða skúlanum í hendi 10. mai 2001. Umsóknarblað fæst á skúlanum.

**Umsókn tímalærari:**
Umsókn við ljósprentum av próvskjølum o.ø., skulu stílast til Føroya Handilsskúla, stýrið og sendast antin til Føroya Handilsskúla í Tórshavn, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177 ella Føroya Handilsskúla á Kambsdali 530 Fuglafjørður og verða skúlanum í hendi 10. mai 2001. Umsóknarblað fæst á skúlanum.

*Á Føroya Handilsskúla fevnir frálæran um FHS-støðisár, Hægri Handilsskúla, stakroyndir, Merkonom, Datanom, Teldustøðingaútbúgving, HD 1. part, peningastovnaskúli og útboðin/umbiðin skeið.*

FØROYA HANDILSSKÚLI

TK Stovan

**VIT HAVA ÚR AT GERA - OG SØKJA ÁGRÝTNAN VIRKISRÁÐGEVA**

Endamál TK Stovunnar er at menna og styrkja føroyskt vinnulív. TK Stovan skal ráðgeva fyritøkum, midla nýggja vitan, sum er viðkomandi í vinnulívinum, og kunna um og ráðgeva føroyskum fyritøkum um galdandi vinnuframaskipanir. Arbeiði TK Stovunnar tekur støði í tørvi vinnunar og fer fram í samstarvi við aðrar føroyskar vinnuframastovnar. TK Stovan heldur til í Tórshavn. Á stovuni arbeiða 4 fólk.

**Starvið:**
Tú skalt, eggjaður av virkjum, eins væl og sjálvboðin:
- eggja virkisleiðslunum til og saman við teimum viðgera ítøkiligar menningarmøguleikar á økjum sum t.d. marknaðarviðurskifti, framleiðslu, vørumenning, tøkni, búskapi og leiðslu.
- kunna um vinnuframaskipanir og eftir tørvi útvega virkjum vitan av so at siga øllum slagi.
- midla uppgávur/verkætlanir til uttanhýsis serfrøðingar.
- skipa fyri og leiða kunningarfundir um evni av týdningi fyri føroyskt vinnulív.

**Vit vænta av tær:**
- at tú hevur nakað av kunnleika um føroyska vinnu, og at tú hevur arbeiðsroyndir .
- at tú ert opin/fryntligur og dugir at fáa í lag samband við fólk. At tú kanst skera ígjøgnum, samstundis, sum tú dugir at lurta eftir øðrum.
- at tú hevur tøkniligan og/ella handilsligan ástøðiligan førleika. Umsøkjarar kønir í fíggjarviðurskiftum og virkisbúskaparviðurskiftum hava fyrimun.
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og klárar at arbeiða við fleiri ymiskum málum samstundis.
- at tú talar og skrivar føroyskt og danskt flótandi.
- at tú hevur telduførleika á høgum brúkarastøði.

Vit kunna bjóða tær nógvar áhugaverdar avbjóðingar og í einum sjálvstøðugum starvi við møguleika at gera júst tína ávirkan galdandi. Samstundis verður tú við í menningini av føroyska vinnulívinum. Løn sambart avtalu.

**Nærri upplýsingar:**
Vilt tú vita meira, áðrenn tú søkir, ert tú vælkomin at tosa við Jákup Mørkøre, stjóra, tlf. 317366.

Skrivlig umsókn, merkt "Virkisráðgevi" við próvtøkuskjølum/viðmælum skulu sendast til:
**TK Stovan,** Niels Finsensgøta 37, 100 Tórshavn í seinasta lagi hósdagin 7. juni 2001

**TK Stovan**
Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn
**Tel** +298 317366, **Fax** +298 319363
tk@tk.fo
**www**.tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR

*TK Stovan er partur av neti við 17 landspartstovum í Danmark og so samskipannarstovuni í Århus, TIC Danmark. Tilsamans arbeiða umleið 180 fólk í TK - netinum. Endamálið hjá TK - netinum er at styrkja menningina í vinnulívinum. Hetta gerst við at arbeiða málrættað og samskipað. Hetta fyri at menningarmøguleikarnir í smærri og meðalstórum virkjum verða viðurkendir og troyttir. TK Stovan er fíggjað av Føroya Landsstýri og donsku stjørnini.*

**Skrivstovufólk**

Til skrivstovu okkara verður søkt eftir skrivstovufólki at arbeiða hálvan dag.

Skrivligar umsóknir verða at senda til skrivstovu okkara, har nærri upplýsingar fáast um starvið.

P/F BYGGITEK
Stiðjagøta 3 · Box 1189 · Tlf. 317585 · FO Tórshavn

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg